6. februar 1958:

# Feigdardagurin hjá Man

**Teir vóru spáddir eina stóra framtíð í fótbóltsheiminum. Teir vóru ungir og evnaríkir, og summir vóru millum størstu fótbóltstalentini, Ongland hevði fostrað. Men fyri júst 50 árum síðani fekk alt ein brádliga enda í München**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Komandi sunnudag, hin 10. februar kl. 13.30 føroyska tíð fer Manchester United á vøllin á Old Trafford at spæla ímóti Manchester City. United fer at spæla í búnum, sum eru álíkir teimum, felagið hevði fyri 50 árum síðani. Talan verður um ein kenslusaman dyst, har United-leikarar og viðhaldsfólk kring allan heimin fara at minnast 50 ára dagin fyri flogvannlukkuna í München. Eisini í Føroyum fara United-viðhaldsfólk at hyggja eftir dystinum saman. Hetta verður í Rex í Havn.

### Dystur í Beograd

Manchester United var á veg heim úr Beograd í gamla Jugoslavia. Har høvdu teir leikt fjórðingsfinalu ímóti Reyðu Stjørnu í Evropa Cup-kappingini fyri meistaralið. Og væl hilnaðist. United fekk 3-3, og komu víðari samanlagt við 5-4, eftir ein 2-1 sigur á Old Trafford. Aftaná dystin fóru United-leikarnir og venjarnir til eina móttøku í Beograd. Matt Busby tók sær av løttum saman við nøkrum vinum og tíðindafólkum. Summir av leikarunum fóru til bretsku sendistovuna saman við flogternunum og flogskiparunum. Aðrir leikarar sótu og spældu poker inntil út á náttina. Men allir vóru tøkir, tá farast skuldi avstað úr Beograd morgunin eftir. Líka frá tí teir fóru avstað, byrjaði tað at ganga galið. Teir vóru seinkaðir í fráferðini, tí Johnny Berry ikki fann passið hjá sær. Men tá tað loksins bleiv funnið í viðførinum, var klárt hjá øllum at fara umborð í flogfarið.

### Ringt sýnið

Tað var ringt sýnið hendan dagin. Men fyrsti flogskiparin, James Thain og annar flogskiparin Kenneth Rayment avráddu, at flúgvast skuldi. Flogfarið var av slagnum »Elizabethan Class G-ALZU AS 57, Lord Burghley«. Á veg heim til Onglands skuldu teir bunkra í München. Tá teir lendu í München kavaði longu illa. Tað gekk skjótt at bunkra, minni enn 20 minuttir. Rayment fekk loyvi at flúgva avstað kl. 14.31, men hann avlýsti hesa royndina, tí honum dámdi ikki tað ójavna ljóðið í flogfarinum. Hann royndi aftur kl. 14.34, men sami trupuleikin var aftur galdandi. Flogskiparnir avráddu, at koyra flogfarið aftur til terminalin til nærri kanningar. Leikarnir og hini fóru úr flogfarinum, og fingu tíðina at ganga við at keypa gávur og sigarettir. Duncan Edwards sendi eitt telegram til vertskonuna í Manchester, sum segði: »Øll flogfør avlýst – stop – flúgva í morgin – stop – Duncan.« Men skjótt eftir hetta vóru øll rópt at koma umborð á flogfarið aftur. Ein tíðindamaður, Alf Clarke frá Manchester Evening Chronicle manglaði. Men hann kom loksins umborð. Nú kavaði illa, og menn byrjaðu at fáa nervar. Liðskiparanum Roger Byrne dámdi ongantíð at flúgva, og var líkbleikur. Johnny Berry tók dýran til, nú fóru øll at verða dripin! »Well, um tað hendir, so eri eg til reiðar.« Svaraði Billy Whelan, sum var trúgvandi katolikkur.



*Fantastiska liðið hjá Manchester United – rópt the Busby Babes. Fótbóltskøn meta, at Ongland væl kundi vunnið HM í 1958, var tað ikki fyri flogvanlukkuna*

### Flogfarið krasjar

Sekundir eftir hetta gongur alt galið. Flogskiparnir gera sína triðju roynd, men flogfarið fer skreiðandi av lendingarbreytini, og fer út á ein koyriveg, sum førir til eitt búsetingarøkið. Vinsti vongur og partur av halanum verða skrødd av, sum flogfarið koliderar við eini hús. Cockpittið fer sendandi inn í eitt stórt træ, og parturin har brennievnið er, rennir inn í einum timburbygningi. Inni í timburbygnginginum stendur ein lastbilur, sum er fullur av brennievni. Lastbilurin spreingist í luftina. Málverjin Harry Gregg veit, at hann er á lívið, tá hann merkir blóð renna niður eftir andlitinum. Hann særr fyrsta flogskiparanum James Thain, sum biður hann renna fyri lívinum. Men Gregg hoyrir eitt lítið barn gráta, og hann fer inn aftur í flogvrakið, hóast eldin og spreingingarnar rundan um hann. Ósjálvsøkni hjá Gregg bjargar lívinum hjá pinkubarninum, mammuni, og fleiri liðfeløgum. Sjálvt um Gregg heldur, at bæði Bobby Charlton og Dennis Violet eru deyðir, so dragsar hann teir úr tí brennandi flogfarinum, og eigur æruni fyri, at báðir yvirliva. Hann bjargaði eisini venjaranum, Matt Busby, sum hevði stórar skaðar. Lunguni vóru punkterað, og beinini vóru brotin. Gregg fekk eisini hjálpt Jackie Blanchflower, sum eisini var illa særdur. Tann deyði Roger Byrne lá oman á Blanchflower.

### Á sjúkrahús

Sjúkrabilar og sløkkiliðsbilar komu á staðið, og tey særdu og deyðu vóru førd til Rechts Der Isar Sjúkrahúsið í München. Matt Busby, Johnny Berry og Duncan Edwards stríddust fyri lívinum. Sum trúgvandi katolikkur fekk Matt Busby tvær ferðir tað síðstu oljuna, men hann kom loksins fyri seg, og eftir 71 dagar vendi hann aftur til Manchester. Johnny Berry yvirlivdi eisini, men skaðarnir vóru so umfatandi, at hann fekk ongantíð leikt fótbólt aftur. Duncan Edwards doyði á sjúkrahúsinum 21. februar.

### Størsta talentið nakrantíð?

Í 1990 var undirritaði til dyst á Old Trafford. Tá ein prátar við eldri United-viðhaldsfólk um Duncan Edwards fáa tey altíð ein klump í hálsin. Sjálvt aftaná Denis Law, George Best, Bobby Charlton, Bryan Robson, Eric Cantona, Ryan Giggs, Wayne Rooney og Christiano Ronaldo eru

## TEIR ÁTTA SUM LÓTU LÍV

**Roger Byrne:** 28 ár. Hann var ein álítandi og tekniskt góður vinstri bakkur. Hann var liðskipari, og verður ofta nevndur tann fyrsti "Busby Babe", tí hann fekk sín fyrsta dyst í 1952, har hann skoraði 7 mál í 6 dystum. Tá leikti hann sum vinstri vongur, og var við til at tryggja Matt Busby tað fyrsta meistaraheitið. Byrne leikti 33 landsdystir fyri Ongland.

**Eddie Colman:** 21 ár. Var frá Manchester-býarpartinum, Salford. Hann leikti sum høgri hálvbakkur. Hann var altíð væl klæddur, og var ein ógvuliga sjarmerandi ungur maður.

**Mark Jones:** 24 ár. Var eitt álit í verjuni. Var sterkur sum ein klettur. Jones hevði eitt róligt sinni, og tað avspeglaði eisini frítíðaríttrivið hjá honum, har hann fekst við brævdúgvir.

**Duncan Edwards:** 21 ár. Edwards leikti saman við Colman á miðvøllinum. Duncan Edwards verður mettur at verða besti leikarin, sum Ongland nakrantíð hevur fostrað. Hann var ein risi á vøllinum. Hann hevði skjótleika, góðan teknikk, og eina ótrúliga likamsstyrki. Edwards leikti 18 landsdystir fyri Ongland.

**Liam "Billy" Whelan:** 22 ár. Frá síni posisjón, sum høgri innari vongur var Whelan ógvuliga kreativur í sínum spæli. Hann var ógvuliga málfarligur. Í 1957 skeyt hann 26 mál í 39 dystum fyri United. Whelan leikti 4 landsdystir fyri Írland.

**Tommy Taylor:** 26 ár. Taylor hevði kelinavnið "The Smiling Executioner". Sum Centre-forward var hann ein veruligur "Targetman", og hann var framúr við høvdinum. Hann vann nógv við sínum smíli. Ein klassiskur nummar 9, sum í 4 ár var tann einasti leikarin Busby keypti til United. Taylor var sjálvsagdur sum centre-forward á enska landsliðnum. Hann fekk 19 landsdystir fyri Ongland.

**David Pegg:** 22 ár. Ein vinstri vongur, sum kann samanberast við Ryan Giggs. Lítil av vøkstri, tekniskt góður, og við evnunum at fara framvið baklinjuni og koma sær inn í málfeltið. 40 ár áðrenn Beckham var Pegg tiltikin fyri sítt hársnið. Hann fekk ein landsdyst fyri Ongland.

**Geoff Bent:** 25 ár. Sum vinstri bakkur var hann eykamaður hjá Byrne, og tí fekk hann ikki so nógvar dystir á besta liðnum, sum talentið annars gav rætt til. Hann skuldi av fyrstan tíð ikki verið við til dystin í Beograd. Men dagin fyri, at Manchester United fór avstað til Beograd ringdi Matt Busby til Geoff Bent, tí Roger Byrne hevði ein minni skaða. Konan og ein nýføddur sonur sótu eftir í Manchester. Tað fylgdi Matt Busby alt lívið, at hann hevði tikið liðið út á eina langa ferð í Evropa. Men lagnan hjá Bent var tað, sum plágaði Matt Busby mest.

### Hini sum doyðu:

**Tíðindamenn:** Alf Clarke, Don Davies, George Follows, Tom Jackson, Archie Ledbrooke, Henry Rose, Eric Thompson og Frank Swift.
**Venjarar og starvsfólk hjá Manchester United:** Walter Crickmer, Bert Whalley og Tom Curry.
**Starvsfólk umborð á flogfarinum:** Kenneth Rayment og Tom Cable.
**Onnur:** Bela Miklos og Willie Satinoff.

Matt Busby vóru undir at byggja eitt nýtt lið upp. Í 1963 eydnaðist tað at vinna ensku steypakappingina. Ì 1967 eydnaðist tað at vinna enska meistaraheitið, og í 1968, júst 10 ár aftaná flogvanlukkuna í München vann United Evropa Cup fyri meistaralið, aftaná 4-1 sigur yvir Benfica við Eusebio á liðnum.